FYLGISKJAL 8

## Anna Borg Dahl

**Fra:** Annika Petersen på vegne af VMR-Journal
**Sendt:** 9. juli 2018 08:52
**Til:** 'Súni Selfoss'
**Emne:** SV: Ískoyti: Viðv. viðmerkingum til lógaruppskot um at einskilja P/F Postverk Føroya

Hey Súni.
Hetta er móttikið og skrásett í málinum um einskiljing av P/F Postverki Føroya.
Vinaliga
Annika Petersen
Uttanríkis- og vinnumálaráðið.

**Fra:** Súni Selfoss
**Sendt:** 6. juli 2018 10:58
**Til:** VMR-Journal
**Emne:** Ískoyti: Viðv. viðmerkingum til lógaruppskot um at einskilja P/F Postverk Føroya

Uttanríkis- og Vinnumálaráðið
Tinganes
Góðan dag,
Vit fara hervið at biða um at fáa hetta ískoyti viðheft til okkara viðmerkingar í samband við hoyringina av lógaruppskotinum um at einskilja P/F Postverk Føroya.

**Ískoyti: Viðv. viðmerkingum til lógaruppskot um at einskilja P/F Postverk Føroya**

24. maj 2018 sendi Starvsmannafelagið Uttanríkis- og Vinnumálaráðnum sínar viðmerkingar til lógaruppskotið at selja almenna partapeningin í Postverki Føroya. Starvsmannafelagið ynskir at gera hesar ískoytisviðmerkingar til hoyringsskriv felagsins:

Starvsmannafelagið vil gera vart við, at tá ið Postverkið bleiv umskipað til eina almenna fyritøku, var tað eitt stórt afturstig fyri rættindini og setanartrygdina hjá starvsfólkunum. Tað var eitt stór framstig fyri starvsfólkini hjá tí almenna, tá ið Fyrisitingingarlógin og Innlitslógin komu fyrst í nítiárunum. Tá kom eitt krav um gjøgnumskygni, eisini í starvsfólkamálum; eitt krav um partshoyring, sakligheit og grundgeving. Hesi rættindi mistu starvsfólkini, tá ið Posta og aðrir stovnar vóru umskipaðir til almenn partafeløg og var hettar eitt stórt afturstig fyri starvsfólkarættindini og hevur eisini víst seg at vera ein trupulleiki í starvsfólkamálum, Starvsmannafelagið hevur havt innlit á Posta.

Starvsmannafelagið heldur tað vera órímiligt, at starvsfólk, sum arbeiða á arbeiðsplássum, sum landið eigur, skulu hava so ólík rættindir. Sáttmálarnir fyri almennu partafeløgini tryggja nøkur av rættindunum, tey høvdu frammaundan, men starvsfólkini, sum arbeiða hjá landi og kommunum eru nógv betri tryggja, og er tað trupult at finna sakligar grundgevingar fyri hví starvsfólk á arbeiðsplássum, sum landið eigur, skulu hava so misjavnar treytir. Felagið hevur víst á, at tað er óhugsandi, at endamálið við at skipa almenn partafeløg í sjálvum sær hevur verið, at gera setanarverjuna verri enn hjá starvsfólkunum í almennu fyritøkunum. Tað kann ómøguligt hava verið endamálið. Tískil hevur Starvsmannafelagið mælt til, at landsstýrið gagnnýtir ta heimild, tað hevur fingið at áseta, at lógin um innlit og fyrisiting eisini verða galdandi fyri almennu partafeløgini, sí §§ 1, stk. 3 í ávíkavist Fyrisitingarlógini og Innlitslógini. Fyri ikki at skaða kappingarføri hjá almennu fyritøkunum hevur Starvsmannafelagið mælt til, at fyrisitingarlógin í minsta lagi verður galdandi fyri starvsfólkaviðurskiftini í almennu partafeløgunum. Hettar var eitt av kjarnumálum felagsins í valárinum 2015 og sum fleiri flokkar í samgonguni tá eisini søgdu seg vera jaliga sinnaðir til.

Higartil hevur landsstýrið bert nýtt sína lóggávuheimild í mun til felagið Visit Faroe Islands, sum er fevnt av Innlitslógini. Greitt er, at fer eigaraskapurin til Posta á privatar hendur verður ikki longur møguligt at geva starvsfólkunum rættindi eftir fyrisitingarlógini. Hesum vil Starvsmannafelagið ávara ímóti.

Sum nevnt í viðmerkingum okkara heldur Starvsmannafelagið, at landið eisini í komandi árum fer at hava áhugamál í Posta og tí framhaldandi eigur at verða eigari av fyritøkuni. Starvsmannafelagið vil tí enn einaferð heita á landsstýrið um at áseta, at í minsta lagi Fyrisitingarlógin verður galdandi í

starvsfólkamálum í teimum almennu partafeløgunum. Hetta so, at starvsfólkini í almennu fyritøkunum vera javnsett við starvsfelagar sínar hjá landi og kommunum.
Vinaliga
Súni Selfoss, formaður
Starvsmannafelagið

please don't print this e-mail unless you really need to